FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA
UNIVERSITY OF THE FAROE ISLANDS

# Leiðbeining til umsóknarblað um upptøku á Fróðskaparsetri Føroya 2014 Kvota 2

Les leiðbeiningina væl, áðrenn tú fyllir umsóknarblaðið út. Skriva týðiliga, helst við spjaldrastavum

Um miðaltalið í gymnasiala miðnámspróvnum ikki er nóg gott, ella tú hevur annað javngott prógv á sama stigi ella hægri, søkir tú inn eftir kvotu 2. Her verða eisini aðrir førleikar enn gymnasialt miðnámsskúlaprógv tiknir við í metingina, sí punkt 2 í vegleiðingini. Umsøkjarin fyllir tá eisini síðu 2 og 3 í umsóknarblaðnum út, punktini 5 til og við 11 og má leggja prógv fyri hesum.
Hevur umsøkjari ikki føroyskt á miðnámsskúlastigi, verður søkt inn eftir kvotu 2. Hesir umsøkjarar skulu upp til eina málsroynd og eftirfylgjandi samrøðu. Nærri kunning um hesa roynd, sí punkt 2 í vegleiðingini.
Hevur ein kvotu 2 umsøkjari nóg gott gymnasialt miðnámsskúlaprógv til at verða upptikin eftir kvotu 1, verður umsóknin flutt yvir til metingar eftir kvotu 1, her er umsóknarfreistin 1. juli 2014.
Upp til 20% av teimum lesandi verða tikin inn eftir kvotu 2-skipanini.

1. **Persónsupplýsingar**

*P-tal*: Um tú hevur føroyskt p-tal, verður tað skrivað her. Hevur tú ikki tað, skrivar tú føðingardag, mánað og ár í teir fyrstu 6 rútarnar til p-tal. Teir 3 síðstu rútarnir eftir strikuna skulu so standa tómir.

*Fornavn*: Her skrivar tú fornavn/nøvn og millumnavn.

*Eftirnavn*: Her skrivar tú eftirnavnið. Minst til, at øll hava bert eitt eftirnavn.

*Bústaðurin* er tað staðið, har ið tú nú býrt. Flytur tú, er tað av týdningi, at tú beinanvegin boðar Fróðskaparsetri Føroya frá nýggja bústaði tínum.

*Ríkisborgaraskapur*: Flestøll, sum búgva í Føroyum, eru danskir ríkisborgarar.

*Teldupostur*: SKAL fyllast út.

*Brek*: Eru viðurskifti, ið tú heldur, at Setrið eigur at verða kunnað um, áðrenn tú byrjar lestur (t.d. at tú hevur dysleksi, niðursetta hoyrn ella sjón, ber likamligt brek), skal hetta viðmerkjast.

2. **Upptøkugrundarlag**

Her skrivar tú árið, tá ið tú tókst gymnasialt miðnámsprógv. Eisini skrivar tú, hvat miðaltal tú hevur og so nummar á fylgiskjalið, prógvið, sum skal sendast við.
Til seinastu upptøku var lægsta miðaltal:

| | |
|---|---|
| Føroyskt – BA | serkrøv |
| Føroyskt – hjánám | serkrøv |
| Søga (Smátjóðir og altjóðagerð) | - |
| Sosialvísindi og samfelagsplanlegging (samfelagsvísindi) | - |
| Politikkur og umsiting (samfelagsvísindi) | - |
| Lærari | 8,3 |
| Námsfrøði | 6,9 |
| Sjúkrarøktarfrøði | 8,5 |
| KT-verkfrøði | serkrøv |
| Lívfrøði | serkrøv |

Lívfrøði og KT-verkfrøð
Tey, sum søkja inn at lesa lívfrøði ella KT-verkfrøði, skulu minnast til at viðmerkja støðið fyri lærugreinarnar støddfrøði, alisfrøði og evnafrøði.

*Krøvini til upptøku eru hesi:*
Lívfrøði: Treyt fyri upptøku er, at umsøkjari hevur miðnámsprógv við:
- alisfrøði á B stigi og
- støddfrøði á B stigi og
- evnafrøði á B stigi.

Miðaltalið í nevndu lærugreinum skal vera í minsta lagi 6 eftir 13-stiganum. Miðaltalið verður roknað av skrivligum og munnligum próvtalsúrslitum ella av endaliga ársmetinum. Aðrar fortreytir við javnsettum kunnleikastøði kunnu góðtakast eftir nærri meting.

KT-verkfrøði: treyt fyri upptøku er, at umsøkjari hevur miðnámsprógv við
- støddfrøði á B-stigi

Miðaltalið í nevndu lærugrein skal vera í minsta lagi 6 eftir 13-stiganum. Miðaltalið verður roknað av skrivligum og munnligum próvtalsúrslitum ella endaligum ársmetum. Aðrar fortreytir við javnsettum kunnleikastøði kunnu góðtakast eftir nærri meting.

Føroyskt-kunnleiki í sambandi við upptøku til lestur á Setrinum
Umsøkjarar, sum ikki hava føroyskt í miðnámsskúlaprógvi sínum, skulu skjalprógva, at tey á annan hátt hava neyðugu førleikarnar at fylgja undirvísingini.

Tey, sum søkja um upptøku til
- føroyskt
- læraraútbúgving
- námsfrøðinginaútbúgving

skulu duga at tosa, lesa og skriva føroyskt.

Skjalprógv
Prógv kunnu vera:
- staðin HF-stakgrein í føroyskum
- Summer School
- Føroyskum fyri útlendingar
- staðið Próvskeið í føroyskum.

Roynd
Eru slík prógv ikki tøk, skulu umsøkjarar upp til eina samrøðu og skrivliga roynd, sum staðfestir kunnleika teirra í føroyskum. Deildirnar, sum hava fingið umsóknir, har hetta kemur upp á tal, skipa í felag fyri samrøðu og roynd. Royndin kann til samans vara ein/hálvanannan tíma.

FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA
UNIVERSITY OF THE FAROE ISLANDS

Danskt
Á øllum útbúgvingunum á Megindeildini fyri hug-, samfelags- og námsvísindi, er neyðugt at duga at lesa danskt.

Føroyskt:
Til at verða upptikin at lesa hjánám og BA í føroyskum krevst bókligt (t.e. gymnasialt) miðnámsprógv við 8 í próvtali í føroyskum.

Sjúkrarøktarfrøði:
Tey, sum søkja inn at lesa sjúkrarøktarfrøði, skulu hava fyrstuhjálparprógv. Er prógvið eldri enn 3 ár í september 2014, skal skeiðið takast um aftur. Sjúkrarøktarfrøðiskúlin skipar fyri skeiði í fyrstuhjálp, áðrenn skúlaárið byrjar. Lesandi rinda skeiðskostnað.

**3. Raðfestingarlisti**

Her skrivar tú, hvørjar útbúgvingar tú ætlar at søkja inn á og í hvørji raðfylgju. Sum fyrsta val skrivar tú ta útbúgvingina, sum tú helst vilt fara undir. Markið er 3 útbúgvingarynski.

Um tú ikki verður upptikin á fremst raðfestu útbúgvingina/útbúgvingarnar,
kanst tú við at seta kross velja at vera á bíðilista til ta ella tær hægri raðfestu útbúgvingarnar.Tú missir tó ikki plássið, sum tú ert komin inn á. Eftir 18. august 2014 ber ikki til at skifta ímillum møguligar raðfestingar.

Um tøk lestrarpláss eru undan lestrarbyrjan verður kunnað nærri um hetta.

**4. Undirskrift - MINST TIL HANA!**

Er ikki dagfesting og undirskrift á umsóknini, verður umsóknin ikki viðgjørd.
Tú skalt sjálv/ur dagfesta og undirskriva umsóknina. Hevur tú ikki møguleika til tað, kanst tú geva eina fulltrú til ein annan persón, sum so hevur fulltrú til at søkja tína vegna. Hendan fulltrú skal sendast saman við umsóknini. Oyðublað til fulltrú er síða 4 í umsóknarblaðnum.

**Umsóknarfreistin til kvotu 2 er 15. mars 2014 á midnátt.**

Um prógv og fylgiskjøl ikki eru tøk til umsóknarfreistina, skulu hesi sendast Fróðskaparsetrinum seinast 1. juli 2014 á miðnátt.

Umsóknin kann sendast teldutøk til:

lestur@setur.fo,

ella við Posta til:
Fróðskaparsetur Føroya
J.C.Svabos gøtu 14,
postsmoga 272,
FO-110 Tórshavn

Eisini ber til at leggja hana í postkassan á Setursskrivstovuni, J.C.Svabos gøtu 14.

*Studni* vil vita, um tú fert at søkja um ÚS lestrarstuðul. Fyri at fáa ÚS skal ein vera fulltíðarlesandi. Eisini er krav um, at tú ikki ert meira enn eitt ár seinkað/ur eftir lestrarætlanini fyri útbúgvingina.

**5. Aðrar útbúgvingar**

Áður tiknar útbúgvingar verða skrivaðar her. Her skalt tú eisini skriva, um tú hevur staðið partar av eini hægri útbúgving.

**6. Onnur prógv umframt miðnám**

Her skulu skrivast øll skeið (eitt nú supplering ella ískoyti), sum skulu takast við, tá ið mett verður um umsókn tína.

**7. Starvsroyndir**

Starvsroyndir verða skrivaðar her. Oyðublað til váttan frá arbeiðsgevara er á síðu 4 í umsóknarblaðnum. Oyðublað/oyðubløð skal/skulu sendast við umsóknini.

**8. Háskúli o.tíl.**

Her verður upplýst um háskúla, húsarhaldsskúla og líknandi próvleys skeið, sum umsøkjarin hevur verið á.

**9. Uttanlandsuppihald**

Her verður skrivað um uttanlandsuppihald, sum eitt nú kunnu skjalprógvast við hotellrokningum, ferðaseðlum o.tíl
.

**10. Viðkomandi royndir**

Her verður upplýst um aðrar førleikar, sum skulu takast við í metingina av umsókn tíni. Talan kann vera um t.d. KT-førleikar, málsligar førleikar ella royndir frá øðrum viðkomandi frítíðarvirksemi.

**11. Frágreiðing um teg sjálva/n**

Ævisøgan skal í mesta lagi fylla eina síðu. Hav í huga, tá ið skrivað verður, at ævisøgan er ein týðandi partur av umsóknini. Hetta er tín møguleiki fyri at koma til orðanna og vísa á, hvør tú ert.
Ævisøgan er ein perspektivering og ein framløga av tínum førleikum. Hon er persónlig og tí er eingin svarlisti, hvussu tú skrivar eina góða ævisøgu
Tó eru nakrar leiðreglur, sum eru góðar at halda seg til:
a) tú skalt lýsa tínar førleikar og royndir og hvørjar tínar ætlanir og ynski eru við hesi útbúgvingini
b) tú skalt m.a. vísa á, hvat tú hevur gjørt fyri at menna og betra teg til at gerast meira skikkaða/n til útbúgvingina
c) tú skalt greiða frá, hvat eggjaði teg til at søkja inn á hesa útbúgvingina. Tað skal síggjast í frágreiðingini, at tú hevur sett teg inn í, hvat hetta er fyri ein útbúgving og hvussu tú ætlar at brúka hesa útbúgving
d) ævisøgan skal vera greið og væl skipað, skriva fyrst um tað, sum er mest avgerandi fyri val tíni
e) tú skal grundgeva fyri øllum útbúgvingum, sum eru á tínum raðfestingarlista

**Hjálp í samband við upptøku**

Eru spurningar í samband við umsóknarblað ella upptøku annars, ber til at venda sær til lestrarvegleiðingina fyri útbúgvingarnar, sí leinkið á http://setur.fo/lestrarvegleiding/ ella við at ringja á telefon 352500 og biðja um lestrarvegleiðing.